## 12 samdøgur - ein heimur

Í einari felags opddagrein í dag krevja 56 bløð kring heimin, at heimsins leiðarar semjast um at fremja neyðug tiltøk fyri at avmarka avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum. Tey 56 bløðini, sum eru úr 45 londum, vísa í dagsins oddagrein á, 11 av teimum seinastu 14 árunum hava verið tey lýggjastu, sum vit vita um, at ísurin í tí arktiska økinum minkar, og at í fjør hækkaðu olju- og matvøruprísirnir sera nógv. Tey 56 bløðini skriva, at veðurlagsbroytingarnar eru úrslit av einari aldarlangari tilgopngd, og at tær kunnu fáa varandi avleiðingar. Tey næstu 12 samdøgrini fara at vísa, um vit fáa møguleikar fyri at temja avleiðingarnar, skriva bløðini.




# Flestu CTD-kanningarnar nú í Klaksvík

**Síðan øll fólk fingu í boði at lata seg kannað fyri CDT móti gjaldi, eru umleið 2000 fólk kannað**



CDT

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Síðan hálvan november hava fólk havt møguleikan at fara á sjúkrahúsini at lata seg kannað fyri sjúkuna CDT. Tey kunnu fáa blóðroyndina tikna, uttan at fara fyrst til kommunulækna bara við at gjalda 100 krónur fyri blóðroyndina.

Og tað er eitt tilboð, sum sanniliga hevur fingið góða móttøku.

Leygardag hevur rannsóknarstovan á Landssjúkrahúsinum havt opið fyrrapart, og bæði á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar Sjúkrahúsi hava tey havt opið mikukvøld.

Áhugi fyri at lata seg kannað er so stórur, at á Landssjúkrahúsinum var bíðitíðin leygardagin hálvur annar tími, sigur Eivi Hansen, leiðari á rannsóknarstovuni.

Síðan henda skipanin byrjaði hálvan november, hevur Landssjúkrahúsið tikið umleið 800 blóðroyndir.

### Langar bíðiraðir

Upp aftur størri er áhugin Í Klaksvík og í Eysturoynni. Á heilusmiðstøðini í Gøtu ber til at lata seg kanna hósdag. Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er rannsóknarstovan opin hvønn dag og annars mikukvøld. Har eru heilt langar bíðiraðir. Klaksvíkar Sjúkrahus hevur í Klaksvík og í Gøtu kannað 607 fólk í november, og tað, sum farið er av hesum mánaðinum eru kannað 495 fólk.

Tað vil siga, at Klaksvíkar Sjúkrahús nú kannar væl fleiri fólk enn Landssjúkrahúsið. Tað kemur av, at Landssjúkrahúsið frammanundan kannaði so nógv, tá ið fleiri tilburðir vórðu funnir í Sandoynni.

### Gjalda gleðiliga

Eisini fólk, sum kundu fingið blóðroyndina tikna ókeypis, tí tey er nær skyldfólk hjá fólki við sjúkuni, fara gleðiliga og fáa blóðroyndina tikna við at gjalda 100 krónur, tí ta er so trupult at sleppa til kommunulækna.

Seinni eru nakrir tilburðar funnir í Eysturoynni, og flestu av teimum familjunum fáa blóðroynd tikna antin í Klaksvík ella í Gøtudali.

Í Suðuroynni er langt frá sami áhugi fyri at fáa blóðroyndina tikna. Síðan november eru har tiknar umleið 100 blóðroyndir, og umleið 600 síðan í summar.

Hesi tøl eru bara tey tey, sum ikki hava ávísing frá kommunulækna og gjalda fyri royndina. Á leið líka nógv fólk eru kannað við ávsíng frá kommunulækna, tí tey eru nær skyld við onkrarn, sum hevur fingið staðfest sjúkuna.

Síðan august eru 25 tilburðir aftrat funnir í Føroyum.

Hava fólk spurningar í sambandi við bloðroyndina, kunnu tey ringja á Landssjúkrahúsið, tlf. 304500, lokal 5619.

# Sløkkja perur á jólatrænum

**Leygarkvøldið hevur onkur klipt ljósketuna á jólatrænum á Vaglinum í petti. Ketan varð sett saman aftur, og 30 perur skiftar út**

HERVERK

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í Havn sum nógva aðrastaðni verður herverk mangan gjørt móti stóru jólatrøunum, sum kommunurnar seta upp.

Summastaðni verða ljósperur knústar, men sambært Esmari Andreasen, formanni á gøtuljósadeildini í Tórhavna kommunu, hendir tað so ikki ofta í Havn. Men javnan eru ljósperur skiftar út, og hann má so avstað við nýggjum perum. Hetta hendir serliga um vikuskiftini.

Leygarkvøldið ella sunnunáttina var størri herverk gjørt móti lýsandi trænum á Vaglinum í Havn.

– Onkur hevur verið við knívi og petta ljósketuna sundur í fleiri petti, sigur Esmar Andreasen.

Sunnudagin fór hann á Vaglið, skoytti ketuna aftur, og neyðugt var at skifta 30 ljósperur út.

Tað er altíð niðast á trænum, at herverk verður gjørt móti ljósperurunum. Træið sjálvt plagar at fáa frið.

Tað er ikki heilt vandamikið, tá ið ljósperur verða tiknar úr. Kemur eitt barn og stingur fingurin í fatningin, fær barnið elektriskan stoyt, tí streymur er á.

Esmar Andreasen veit ikki, hvat herverkið hvørt ár kostar kommununi. Hann heldur tað vera lítla meining í at taka ljósperurnar, tí tær kunnu ikki brúkast aðrastaðni.

Perurnar eru 15 watt.

# Bót fyri at skjóta villgæs

**Tveir menn, sum leygardagin vórðu tiknir fyri at skjóta villgæs, fáa bót**

VILLGÆS

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sera nógvar villgæs eru í Føroyum, og tær eru nógvastaðni illa lýddar.

Men harfyri er ikki loyvt at skjóta gæsnar.

Leygardagin varð meldað til løgregluna, at tveir ungir menn høvdu skotið villgæs á Velbastað.

Menninir, sum høvdu verið og skoti harur, viðgingu tað, teir høvu gjørt. Teir søgudu seg kki vita, at ikki var loyvt at skjóta villgæs.

Teir fáa bót.

# Taka nummarplátur

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara politið, sum fer út og tekur nummarplátur av bilum.

Líkt er til, at onnur halda tað vera stuttligt.

Leygardagin hevur onkur verið og tikið pláturnar av fýra bilum, sum stóðu í miðbýnum í Havn.

Fyrrapartin í dag visti politiið ikki, hvør farin var við plátunum, og pláturnar vóru ikki komnar aftur í aftur.

Tað kemur illa við hjá einum bileigara at missa pláturnar á henda hátt, tí tað ostar nkógv at fáa nýggjar pláturnar. Tað er annars eitt mál millum bileigaran og tryggingina.

# Salmonella í salami

**Føroya Keypssamtøku náddi at kalla allar speygupylsurnar inn aftur, áðrenn vørurnar komu á hillarnar í handlunum. Salmonella var funnin í vørunum**

SALMONELLA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Matvørueftirlitið í Danmark er strangt, og javnan verða vørur kallaðar aftur, tí óynsktar bakteriur eru funnar í teimum.

Í seinstu viku komu boð frá danska stovninum Fødevarestyrelsen um, at eitt slag av salmonellu-bakteriu var funnin í nøkrum salami-vørum.

Vørurnar vóru millum annað seldar í FK-handlunum.

FK váttar, at teirra handlar høvdu fingið eina sending av ávísu vørunum, men boðini komu so skjótt, at til bar at kalla vørurnar aftur, áðrenn tær vóru komnar á hillarnar.